Framhald av síðu 11

at altjóða dystir hjá feløgunum kunnu leikast á heimavøllinum hjá luttakandi felagnum.

Út frá hesum er mest sannlíkt, at talið á altjóða dystum, sum verða leiktir á vanligum grasi fer at fækkast, og tí kann roknast við, at í framtíðini verða bert heilt fáir dystir leiktir á Tórsvølli pr. ár.

Tað sum hevði tænt fótbóltinum í Gundadali og í Havnini annars best var, um graslíki góðkent av UEFA og FIFA til altjóða dystir varð lagt á Tórsvøll, tí tá høvdu havnarfeløgini fingið ein vøll afturat til venjing og dystir, og hevði hetta ment fótbóltin í høvuðsstaðnum munandi.

### A-landsliðið á Tórsvølli — nøkur tøl

Higartil eru 6 A-landsdystir leiktir á Tórsvølli, 3 í 1999, 1 í 2000 og 2 í 2001, og eru hesi miðaltøl:

miðal áskoðaratal 2.957
miðal inntøkan pr. dyst kr. 261.035,-
miðal áskoðaragjald kr. 88,-
miðal útreiðsla: til ferðing, gisting, kost, samsýningar v.m. kr. 245.142,-
miðal gjald til Tórsvøll pr. dyst kr. 70.000,-
miðal hall pr. dyst leiktur á Tórsvølli higartil kr. 54.107,-

### Tórsvøllur

Tað er alment kent, at Grunnurin Tórsvøllur er ein vinnurekandi grunnur, og var hesin grunnur stovnaður fyri at fullføra verkætlanina Tórsvøllur, í Gundadali, og fyri á henda hátt at fáa til vega pening frá vinnulívinum, nakað sum Tórshavnar Kommuna ikki hevði góðar møguleika til. Stórar sum smáar fyritøkur hava latið grunninum stuðul, og tilsamans eru nógvar milliónir goldnar í stuðli, sum tá alt kemur til alt er eitt kommunalt byggjarí. Ítróttarfeløg og sersambond kenna uttan iva hesi orðini, »tíverri, vit hava valt at stuðla Tórsvølli«, hesin peningur sum annars hevði farið til ítrótt og mentan.

Hvussu Grunnurin Tórsvøllur er fyri í dag, kann metast soleiðis um, samlaða skuldin, sum ikki er fastløgd, er helst umleið 6 mill. kr. Og um 80'ara hugburðurin verður brúktur, man helst verða ætlanin at byggja víðari, fyri at sleppa undan at síggja veruleikan í eyguni. Hinvegin kann eisini hugsast, at peningastovnarnir hava valt at slaka í rentu og møguligari skuld, og at Tórshavnar Kommuna letur vinnurekandi Grunninum Tórsvølli, stuðul so ella so, ella kemur at gera tað fyrr ella seinni.

### Fótbóltssambandið — Tórsvøllur

Alla ta tíð Heðin Mortensen arbeiddi við ætlanini í sambandi við Tórsvøll, vísti Fótbóltssambandið á, at Fótbóltssambandið ikki ynskti at verða fíggjarliga heft í sambandi við møguliga bygging av nýggjum altjóða leikvølli í høvuðsstaðnum, hóast FSF metti, at tørvur var á einum altjóða vølli afturat, um møguleiki skuldi verða fyri hjá FSF, eisini at hava eitt U21 landslið. Hinvegin var FSF avgjørt sinna at gera samstarvsavtalu við nýggja leikvøllin, um hesin gjørdist veruleiki.

Í 1998 stovnar Tórshavnar Býráð, vinnurekandi grunnin Tórsvøllur, og verður Poul Michelsen valdur til formann. Eins og áður verður ført fram, at fyritreytin fyri, at fáa ætlanina upp at standa er, at Fótbóltssambandið er við, bæði moralskt og fíggjarliga. Uttan at fáa nakra nýggja ávirkan góðtekur Fótbóltssambandið at stuðla ætlanini við 1,5 mill. kr. Her skal viðmerkjast, at FIFA munnliga, yvirfyri undirritaða, hevur víst ónøgd við, at Fótbóltssambandið lat nevnda stuðul. Ein av treytunum frá FSF, fyri at lata stuðulin var, at »tornið« sum ætlanin var at gera við langsíðuna, varð víðkað soleiðis, at húsið við Tórsvøll kundi byggjast, við tí fyri eygað at krøvini frá UEFA, í sambandi við nýtslu av vøllinum kundu gangast á møti.

Frá UEFA varð staðiliga víst á, at neyðugt var við hesum húsi, fyri at vøllurin skuldi verða góðkendur av UEFA til altjóða dystir, og at nýtsla av felagshúsunum í Gundadali so avgjørt var ein fyribilsloysn.

Tíverri — vísti tað seg, at Grunnurin Tórsvøllur ikki megnaði, at gjøgnumføra ætlanina við húsinum, við tí úrsliti, at Fótbóltssambandið formliga »keypti« bygningin, frá Grunninum Tórsvøllur, so sum byggningurin stóð, fyri 4 mill. kr. Síðani hevur Fótbóltssambandið innilokað bygningin, og er samlaði kostnaðurin av hesum arbeiðið umleið 2,6 mill. kr., men av tekniskum orsøkum er bygningurin ikki yvirtikin av Fótbóltssambandinum enn.

Tað vil við øðrum orðum siga, at »Tórsvøllur« higartil hevur kostað Fótbóltssambandi Føroya — føroysku fótbóltsfeløgunum — umleið 8.1 mill. kr., trekkja vit lánið frá UEFA umleið 2 mill. kr. og goldnan stuðul frá Mentamálastýrinum kr. 1.350.000,- frá, eru kontant goldnar umleið 4,75 mill. kr.

Tað hevur verið ført fram, at raksturin av Fótbóltssambandinum ikki fór at verða raktur av Tórsvallar ætlanini, og er tað rætt, tí nevnda íløga 4,75 mill. kr. eru eyka inntøkur Fótbóltssambandsins seinastu trý árini.

Eftir er liðugtgerð av bygninginum innan, og kann roknast við, at hetta arbeiðið við installatiónum, innbúgvi, telduútbúnaði v.m. kostar umleið 10 mill. kr. av hesum er FIFA sinna at rinda í stuðli umleið 6 mill. kr., men er hesin stuðul ikki oyramerktur til húsið við Tórsvøll, men er oyramerktur til høvuðsmiðstøð hjá Fótbóltssambandinum við øllum tí, sum eini høvuðsmiðstøð til hoyrir. Stuðulin frá UEFA er umleið 0,5 mill. kr., stuðulin frá Mentamálastýrinum er 1.35 mill. Eftir at fíggja er umleið 2,15 mill. kr.

Íløgan í bygningin, umleið 1250 m2, við øllum installationum, innbúgvi v.m. — lyklaklárur, verður umleið 16.6 mill. kr. Leggja vit stuðulin til Tórsvøll afturat, er talan um eina samlaða íløgu uppá 18,1 mill. kr.

Vit kunnu so spyrja, um hetta er skilabesta íløga sum Fótbóltssambandið, vegna feløgini er í holt við, — ella um peningurin kundi verið brúktur betur og á annan hátt.

Nú farast skal undir liðugtgerð av bygninginum, er neyðugt hjá Fótbóltssambandinum at hugsa seg serstakliga væl um, skal Fótbóltssambandið binda feløgini við eini samlaðari íløgu uppá 18,1 mill. kr. í Tórsvøll.

Enn er formliga gjørligt hjá Fótbóltssambandinum at bakka út úr Tórsvallar ætlanini, og hevur Grunnurin Tórsvøllur tá møguleika fyri, at yvirtaka bygningin sum hann stendur, virðið umleið 6,6 mill. kr. Síðan kann FSF byggja høvuðsmiðstøð til virksemi hjá Fótbóltssambandinum — fótbóltsfeløgunum aðrastaðni.

### Minstukrøvini frá UEFA til feløgini

Sum øllum fótbóltsfeløgunum kunnugt, koma um ikki so langa tíð, minstukrøvini frá UEFA til feløgini í gildi, og leysliga mett, koma minstukrøvini at kosta feløgunum — umsitingina og infrastrukturur — umleið 100 mill. kr. komandi 5 árini, hetta eru krøv sum UEFA setir, fyri at feløgini skulu varðveita rættin at luttaka í UEFA kappingum fyri lið.

Vónandi kann skipast so fyri, at feløgini ikki føla seg sleptan upp á fjall, men at Fórbóltssambandið saman við landi og kommunum, stuðla upp undir, fyri at betra um umstøðurnar hjá fótbóltinum kring landi.

### Gamla verkætlanin

Vísandi til gongdina í Tórsvallarætlanini, menningina innan graslíkið og við atlitið til økið í Gundadali í síni heild, er stóri spurningurin, um ikki fótbólturin og frælsi ítrótturin eiga at finna saman, heldur enn, at fótbólturin stuðlar uppundir, at Gundadalur verður miðdepil fyri skrivstovu/hotel/røktar- og handils virksemi.

### Tórshavnar Kommuna

Tað er eitt sindur torskilt at finna út av, hvør varar av Gundadali, og hvat virksemi, ætlanin er, skal vera í Gundadali.

Men tað er einki dulsmál, at tað er Tórshavnar Kommuna, sum hevur lykilin til loysn á trupulleikunum í Gundadali, og eru møguleikarnir fleiri fyri eini skilagóðari loysn fyri ítróttin, um so er, at tað er aðalmálið, millum annað hesir:

- Avtala verður gjørd millum Tórshavnar Kommuna og Fótbóltssambandið, har Fótbóltssambandið yvirtekur Tórsvøll — undir ávísum treytum — fíggjarliga og ítróttarliga.
- Tórshavnar Kommuna, endurrindar Fótbóltssambandinum fyri íløguna í húsið við Tórsvøll, soleiðis at Tórshavnar Kommuna eigur og rekur Tórsvøll á kommunalum grundarlag.
- Tórshavnar Kommuna, rekur Tórsvøll á kommunalum grundarlag, tó so, at Fótbóltssambandið byggir húsið liðugt, og gjørd verður samstarvsavtala millum Tórshavnar Kommunu og Fótbóltssambandið um virksemi á Tórsvølli.

Ynskt verður øllum eini gleðilig jól og eitt gott nýtt ár.

## Dystir um vikuskiftið

### Hondbóltur

| Dagf. | klokkan | Dystur | Dómarar |
|---|---|---|---|
| **1. deild kvinnur** | | | |
| 22.12 | 14.30 | Neistin-VB | Hannis/Uni |
| 22.12 | 16.00 | Sóljan-VÍF | Poli/Jústines |
| **1. deild menn** | | | |
| 22.12 | 16.00 | Tjaldur-StÍF | Hjalmar/Kristian |
| 22.12 | 16.00 | Neistin-KÍF | Hannis/Uni |

### Flogbóltur

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Meistaradeild kvinnur** | | | |
| 22.12 | 13.00 | Fleyr-ÍF | Mjølnir |
| 22.12 | 13.00 | Dráttur-TB | Mjølnir |
| **Meistaradeild menn** | | | |
| 22.12 | 14.00 | SÍ-Fram | Mjølnir |
| 22.12 | 15.00 | Fleyr-ÍF | Mjølnir |

## Upptaktirnar?

Sum tað framgongur av blaðnum, sum lesarin hevur í hondini, so er hetta eitt av meira teimum meira rúgvusmiklu. Nakað sum lesararnir ivaleyst og vónandi eru fegnir um.

Rúgvan av tilfarið hevur tó í hesum umfarinum viðført, at tað ikki hevur verið rúmd fyri upptaktunum, sum vit vanliga hava í blaðnum til vikuskiftið, tó at dystaryvirlitið fyri hond- og flogbólt framgongur á hesi síðu.

Vit mugu tí biðja lesararnar halda okkum til góðar, og um tað kann vera ein hjálp, so eru vanligu upptaktirnar at finna á internetblað okkara, www.sosialurin.fo.

At enda vil undirritaði nýta høvi til at ynskja lesarum, íðkarum og ikki minst trúgvu heimildarfólkum okkara eini gleðilig jól.

-jm


# Vikuskifti

Nr. 248 • leygardagur • 22. desember 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo




**Jólini eru vorðin ein sølustevna**

Støðan er so óhugnalig, at fólk eru farin at taka lán at keypa jólagávur fyri. Eini friðalig jól eru nokk ikki at finna longur, heldur Petur Martin Rasmussen, fyrrverandi sóknarprestur

Lesið á síðu 12-13

7 ára gamli Rúnar um jólamannin og nissuna í Hesti:

# Tey búgva uppi á oynni



*Rúnar hevur sæð jólamannin*

JÓL

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*
*Jens K. Vang (myndir)*

Rúnar Silvurstein er ein fittur og eygagóður sjey ára gamal smádrongur í Hesti, og hann er ógvuliga spentur í hesum døgum. Hann hevur fingið ein nýggjan vinmann og hesin býr heilt uppi á Oynni.

- Eg veit ikki ordiliga, hvar hann býr, men hann man búgva aftanfyri ein stein har uppi. Hann er í hvussu er til, og hann er ein góður jólamaður, tí hann hevur givið mær gávur hvønn tann einasta dag nú í longri tíð. Hann kemur heim til okkum um náttina og hongir gávurnar í kalendaran, sigur Rúnar Silvurstein og er púra sannførður.

- Ofta fái eg bomm og onkuntíð ein slikkipinn. Hendan eti eg beinanvegin áðrenn morgunmat, sjálvt um mamma ikki ordiliga vil, sigur Rúnar við einum smíli.

- Onkuntíð fái eg ting, men eg havi enn ikki fingið tað sum eg ordiliga ynski mær. Tað er ein fartelefon og hon eitur Nokia 3330. Men eg haldi ikki, at jólamaðurin klárar at geva mær eina fartelefon, tí tær eru ikki í Hesti, og slett ikki uppi á oynni, so hana má eg helst fáa úr Havn, sigur Rúnar og er eitt sindur keddur á málinum.



*Malan fær ikki gávur frá jólamanninum, men frá eini nissu, sum eisini býr uppi á oynni.*

NISSAN

Tvey børn fáa gávur hvønn morgun í Hesti hesa tíðina. Vit hava longu skrivað um Rúnar og hin er ein genta, sum er átta ára gomul og eitur Malan Johannesen. Hon gongur í øðrum flokki.

- Men eg fái ikki gávurnar frá jólamanninum, eg fái mínar frá eini jólanissu, sum eisini býr uppi á oynni og eg haldi saman við jólamanninum. Jú, hon býr á sama stað har sum jólamaðurin býr, eg eri púra sikkur, sigur Malan Johannesen.

*Hevur tú nakrantíð sæð nissuna?*

- Ja, men hon skundaði sær so nógv, at eg sá hana ikki ordiliga. Eg veit ikki ordiliga, hvussu hon sá út, men hon var í reyðum klæðum. Eg haldi, at hon er rík, tí onkuntíð havi eg fingið pengar, eg havi eisini fingið bomm og ting. Eg ynski mær eina súkklu, hana ynski eg mær allarmest, sigur Malan.

- Men tað kann gott vera, at hon er í hoyggjhúsinum onkuntíð. Eg havi verið og hugt, men eg havi ikki sæð hana enn, sigur Malan.

*Hevur tú prøvað at sett mjólk fyri hana í hoyggjhúsinum. Hvis glasið er tómt tá tú kemur aftur, so hevur hon verið har?*

-Nei, men hvis glasið var vekk og ein gáva lá í staðin, so hevði tað verið ordiliga gott, sigur Malan og nú hevur hon bestemmað seg. Hon fer at seta mjólk í hoyggjhúsið.

Rúnar hevur eisini sæð jólamannin, men hann minnist ikki heilt hvar.

- Hann var stórur og var í reyðum klæðum, sigur Rúnar.

*Dugdi hann at snakka?*

-Ja, hann snakkaði líka sum vit gera í Hesti, akkurát líka haldi eg. Eg havi sæð hann í skúlanum og eg havi eisini sæð hann heima, men eg minnist ikki akkurát, hvussu tað var, sigur Rúnar.

TRÝR IKKI UPPÁ JÓLAMANNIN

Systurin hjá Rúnar eitur Jónvør og hon er 12 ára gomul. Hon gongur eisini í Skúla í Hesti, hon gongur í sætta flokki. Hon er eitt sindur óheldig, tí hon hevur ongantíð trúð upp á jólamannin hjá Rúnar ella Jólanissuna hjá Maluni og so fær hon heldur ikki nakra jólagávu.

- Eg trúgvi so slett ikki upp á jólamenn og nissur, men eg gleði meg til jóla. Eg pynti og hugni mær og tað eru eisini so deiliga nógv fólk í Hesti um jólini, sigur hon.

Jónvør er einasta 12 ára gamla gentan í Hesti og hon hevur sostatt heldur onga venindu í bygdini. Men hon hevur venindur og tær búgva í Havn og tær eru saman so ofta tað ber til. Um eitt ár fer hon at ganga í skúla í Havn.

RÚNAR VERÐUR EINSAMALLUR

Um tvey ár, í 2003 og fram til 2005 ,verður Rúnar einasti næmingur í skúlanum í Hesti. Tá fær hann selskap aftur frá einum fittum smádrongi sum eitur Niclas Lyngvej og hann er trý ára gamal í dag og trýr fast upp á bæði jólanissur og jólamenn. Lærarin í Hesti eitur Jóan Petur Midjord. Hann er úr Havn og hevur verið lærari í Hesti í tvey og eitt hálvt ár.



*Jónvør trýr slett ikki upp á jólamenn og nissur og fær tí onga gávu frá teimum.*